# Christian Høgni avgreiddur


*Christian Høgni Jacobsen kann nú veruliga fara undir royndirnar at vinna sær pláss á liðnum hjá Esbjerg*

**Semja er fingin í lag millum Esbjerg og NSÍ, og spæliloyvið nú endaliga latið Esbjerg**

FLYTING
*Jákup Mørk*

Nakað av tvídrátti tók seg upp ímillum NSÍ og danska superligufelagið, Esbjerg, tá tað fyri einum mánaði var greitt, at danska liðið vildi hava Christan Høgna Jacobsen knýtt at sínum leikarahópi.

Tvídrátturin stóðst av, at feløgini bæði høvdu hvør sína uppfatan av, hvat eitt rímuligt endurgjald til NSÍ fyri leikarin skuldi verða, og hetta merkti so aftur, at spæliloyvið hjá Christian Høgna varð afturhildið.

Nú er so ein loysn funnin á málinum, og hóast hon helst kundi verið betri fyri runavíkingar, so er málið avgreitt.

- Soleiðis sum alt útviklaði seg, so varð talan um eina nøktandi loysn fyri okkum, sigur Hans Petur Ellingsgaard, sum er formaður í leiðslubólkinum hjá NSÍ.

- Spæliloyvið er sent til Danmarkar, so Christian Høgni er nú Esbjerg spælari, staðfestir formaðurin at enda.

# Daewoo Marathon Cup 2001

**Hallur Holm vann fyrsta umfarið av Daewoo Marathon Cup 2001**

RENNING
*tíðindaskriv*

Leygardagin varð fyrsta umfarið av Daewoo Marathon Cup kappingini í renning fyriskipað í Klaksvík. Kappingin hevur fýra umfør, og tann samlaði teinurin er eitt marathon t.v.s. 42,195 km. Vinnarin av samlaðu kappingini er tann rennarin, ið hevur nýtt stytst tíð samanlagt.

Samanumtikið var tiltakið væleydnað. Eini 60 luttakarar vóru til kappingarnar, meginparturin av hesum vóru børn. Umstøðurnar at renna vóru hampiliga góðar, hóast nakað av vindi var.

## Hallur vann

Hjá monnunum vann Hallur Holm á Daewoo Marathon Cup meistaranum í fjør Guttormi Sørensen. Teir báðir fylgdust megin-partin av teimum 5 kilometrunum, men tá teir fyri triðju ferð fóru niðan eina brætta brekku, mátti Gutti lúta. Kappingin um triðja plássi stóð millum Cecil Weihe og Sigurð Justinussen. Sigurð dróg longra stráðið hesuferð. Tilsaman 10 menn luttóku í fyrsta umfarinum av kappingini og hava tí møguleika at renna tann fulla teinin.

Spennandi verður at síggja, hvussu leikur fer næsta vikuskifti, tá næsta umfar av Daewoo Marathon Cup verður runnið í Havn. Tá skulu tey vaksnu renna eitt hálvmarathon.


*Hallur Holm vann fyrsta umfarið í Daewoo-renningini í ár, og fyribils hevur hann sostatt lagt seg á odda*

## Tey yngru

Kapping var eisini fyri børn leygardagin. Tey runnu 870 m. Hjá børnum undir skúlaaldur vunnu ávikavist Lisa Joensen og John Viljam Johannesen. John Viljam legði so mikið fyri, at hann misti skógvin á vegnum. Hann tók sær ikki tíð at seta hann á aftur, men rann teir seinatu 200 metrarnar við bert einum skógvi.

Tey størru børnini kappaðust í tveimum aldursbólkum. Henda kappingin var eisini tann fyrsta av fýra. Hini umførini verða komandi tríggjar leygardagarnar í samband við kappingarnar hjá teimum vaksnu. Tann samlaði teinurin hjá størru børnunum er eitt sonevnt minimarathon, ið er ein tíggjundapartur av einum marathon t.v.s. 4,2 km.

Í bólkinum 1.-3. flokk vunnu Vilbjørg Johannesen og Ivan Joensen. Í bólkinum 4.-6. flokk vunnu Karina Hansen og Álvur F. Christiansen.

Øll úrslitini síggjast aðra staðni á síðuni.

Sum nevnt verður næsta umfar av Daewoo Marathon Cup í Havn leygardagin 22. september. Tey vaksnu renna tá eitt hálvmarathon, 21,1 km. Børn undir skúlaaldur renna 500 m, og børn 1.-3. flokk og 4.-6. flokk renna 1000 m.

Fyrireikararnir leggja dent á, at øll eru vælkomin at luttaka, hóast tey ikki eru við í samlaðu Daewoo Marathon Cup kappingini.

Annars sær skráin leygardagin soleiðis út:

12.30 Tilmelding á Bursatanga
13.00 Startur Hálvmarathon kvinnur og menn
13.20 Børn undir skúlaaldur renna 500 m
13.40 Børn 1.-3. flokk renna 1000 m
13.50 Børn 4.-6. flokk renna 1000 m
14.00 Fyrstu trý børnini í hvørjum bólki hjá gentum og dreingjum fáa heiðursmerki.

### Menn

| Nr. | Tíð | Navn | Umboðar | árg. |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 16.52 | Hallur Holm | Bragdið | 67 |
| 2 | 17.16 | Guttorm Sørensen | Treysti | 68 |
| 3 | 18.16 | Sigurð Justinussen | Bragdið | 67 |
| 4 | 18.24 | Cecil Weihe | Bragdið | 65 |
| 5 | 18.51 | Sølvi R. Hansen | Roysnið | 70 |
| 6 | 19.08 | Bogi Joensen | Treysti | 73 |
| 7 | 19.37 | Jonhard Larsen | Treysti | 66 |
| 8 | 19.47 | Niels Jákup Jakobsen | Bragdið | 63 |
| 9 | 21.01 | Flemming Petersen | Roysnið | 60 |
| 10 | 22.53 | Regin Jóanesarson | Vestmanna | 45 |

### Gentur undir skúlaaldur

| Nr. | Tíð | Navn | Umboðar | aldur |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 5.34 | Lisa Joensen | Klaksvík | 4 |
| 2 | 5.40 | Valborg Vang | Klaksvík | 5 |
| 3 | 5.50 | Jansy Jacobsen | Treysti | 3 |
| 4 | 7.19 | Marianna G. Eystberg | Klaksvík | 3 |
| 5 | 7.51 | Tóra Isaksen | Klaksvík | 3 |

### Dreingir undir skúlaaldur

| Nr. | Tíð | Navn | Umboðar | aldur |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 4.26 | John Viljam Johannesen | Treysti | 6 |
| 2 | 4.29 | Páll R. Weihe | Bragdið | 5 |
| 3 | 4.29 | Tórur Justesen | Klaksvík | 6 |
| 4 | 5.07 | Fríði Sigurðsson | Klaksvík | 6 |
| 5 | 5.10 | Alvi Mikkelsen | Klaksvík | 5 |
| 6 | 5.31 | Beinir Johannesen | Treysti | 4 |
| 7 | 5.55 | Steingrímur Hallson | Bragdið | 4 |
| 8 | 6.12 | Hjørtur Ellingsgaard | Tórshavn | 5 |
| 9 | 6.21 | Osvald á Marknagili | Klaksvík | 4 |
| 10 | 6.32 | Jósvein Joensen | Klaksvík | 5 |

### Gentur 1.-3. Flokk

| Nr. | Tíð | Navn | Umboðar | aldur |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 3.51 | Vilbjørg Johannesen | Treysti | 9 |
| 2 | 3.59 | Jórun Klakstein | Klaksvík | 8 |
| 3 | 4.07 | Louisa Østerø | Klaksvík | 8 |
| 4 | 4.11 | Jónvør Christiansen | Klaksvík | 7 |
| 5 | 4.28 | Elsebeth Danielsen | Klaksvík | 7 |
| 6 | 4.32 | Guðrið Eystberg | Klaksvík | 6 |
| 7 | 4.35 | Gunnrið Fríða Joensen | Klaksvík | 6 |
| 8 | 4.42 | Monika Joensen | Klaksvík | 8 |
| 9 | 4.44 | Erla Vang | Klaksvík | 9 |
| 10 | 4.45 | Bergfríð Joensen | Klaksvík | 6 |
| 11 | 4.48 | Elsa Krosstein | Klaksvík | 8 |
| 12 | 4.57 | Ebba Isaksen | Klaksvík | 7 |
| 13 | 4.58 | Monika Biskopstø | Klaksvík | 6 |
| 14 | 5.26 | Hanna Sigurðsson | Klaksvík | 7 |
| 15 | 5.29 | Sólrun Larsen | Klaksvík | 6 |

### Dreingir 1.-3. Flokk

| Nr. | Tíð | Navn | Umboðar | aldur |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 3.32 | Ivan Joensen | Klaksvík | 9 |
| 2 | 3.37 | Sigmund Olsen | Hvannasund | 9 |
| 3 | 3.48 | Teitur Hansen | Treysti | 9 |
| 4 | 3.52 | Aksel Dalsgaard | Klaksvík | 8 |
| 5 | 3.52 | Gunnar Christiansen | Klaksvík | 9 |
| 6 | 4.16 | Ragnar Danielsen | Klaksvík | 9 |
| 7 | 4.34 | Agnar Frederiksen | Klaksvík | 8 |
| 8 | 4.46 | Ásbjørn Vang | Klaksvík | 7 |
| 9 | 5.13 | Marno Guðjonsson | Klaksvík | 9 |
| 10 | 5.38 | Jóhan Jacobsen | Hvannasund | 9 |

### Gentur 4.-6 flokk

| Nr. | Tíð | Navn | Umboðar | aldur |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 3.34 | Karina Hansen | Treysti | 12 |
| 2 | 3.43 | Christa Weihe | Bragdið | 10 |
| 3 | 4.27 | Karla Isaksen | Klaksvík | 10 |

### Dreingir 4.-6. Flokk

| Nr. | Tíð | Navn | Umboðar | aldur |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 3.02 | Álvur F. Christiansen | Norðdepli | 12 |
| 2 | 3.14 | Hjalti Heðinsson | Klaksvík | 11 |
| 3 | 3.16 | Jan Elmar Sørensen | Treysti | 9 |
| 4 | 3.26 | Bogi Jacobsen | Treysti | 9 |
| 5 | 3.37 | Tummas Jstinussen | Bragdið | 11 |
| 6 | 4.03 | Emil Biskopstø | Klaksvík | 10 |
| 7 | 4.12 | Olvheðin Jacobsen | Hvannasund | 11 |



# Torleif situr til eftir ársskiftið

**FSF formaðurin heldur tað vera órógvandi, at so at siga sama manning hevur verið í nevndini í tjúgu ár**

FSF-BOSSUR
*Jóannes Hansen*

Tað var sama kvøldið, sum Russland og Føroyar spældu landsdyst á Tórsvølli, at FSF formaðurin í Dimmalætting almannakunngjørdi tað, sum inntil tá høvdu verið óváttað leysatíðindi.

Torleif Sigurðsson segði 5. september, at hann ætlaði sær frá sum formaður í FSF, og hann vísti sjálvur á 24. oktober, sum er 20 ára dagurin í formanssessinum.

Stutt eftir endurtók FSF formaðurin tíðindini í sendingini hjá Norðlýsinum í Rás 2. Tað vil siga, at komandi mánadag verður tað ein mánaði, inntil Torleif Sigurðsson ikki verður FSF bossur longur – um hann framvegis hevur somu ætlan, sum hann hevur sagt seg at hava.


*Torleif Sigurðsson heldur tað vera óheppið, at tað aftur og aftur eru somu umboð, sum verða vald í nevndirnar*

Fert tú úr sessinum 24. oktober?

– Tað rokni eg ikki við. Eg verði ivaleyst sitandi inntil aðalfundin, sum verður eina ferð eftir ársskiftið.

Hví hevur tú broytt støðu?

– Eg veit ikki, um eg havi broytt støðu. Tá eg nevndi 24. oktober, so var tað tí, at henda dagin hevði eg verið í sessinum í 20 ár. Eg helt eisini, at tað kanska var skilabest at fara frá, tá eitt kappingarár var liðugt – bæði heima á landi og í landsliðshøpi. So hevði ein nýggjur formaður staðið fremst í fyrireikingunum til nýggja árið. Men nú verður skiftið at bíða inntil aðalfundin. Hinir nevndarlimirnir hava heitt á meg um at bíða inntil tá, og tað eri eg gingin við til.

Tú hevur áður tosað um at fara frá, men so hevur tú kortini tikið við afturvali. Verður tað á sama hátt hesa ferð?

– Avgjørt ikki. Eg havi gjørt upp við meg sjálvan, at nú er mín tíð í nevndararbeiði innan fótbóltin liðug. At eg havi alment boðað frá hesum, haldi eg hevur havt ta ávirkan, at hinir limirnir í FSF nevndini og vónandi eisini limafeløgini fara at fyrireika seg, so tað verður greitt, hvør skal taka við.

Ofta plagar tað at vera soleiðis, at tá ein formaður sigur seg frá, so er tað púra upplagt, hvør skal taka við. Men Torleif Sigurðsson sigur seg ikki hava nakað boð uppá, hvør skal vera formaður, tá hann hevur lagt frá sær:

– Eg vóni, at tann, sum verður valdur, fer at hava góða undirtøku. Tað verður óheppið, um talan verður um kampval millum seráhugamál, og at annað valevni verður valt við teprum meiriluta, heldur FSF formaðurin seinastu tjúgu árini.

## Vandamikið

Tá Torleif Sigurðsson boðaði frá, at hann ætlar at leggja frá sær sum formaður í Fótbóltssambandinum, so endurtók hann, at hann helt tað vera sera óheppið fyri Fótbóltssambandið og føroyskan fótbólt, at tað aftur og aftur er talan um afturval, tá nevndin í FSF skal mannast. Hetta er tað sama, sum hann segði á aðalfundinum í fjør:

– Eg eri framvegis av hesi áskoðanini. Eg veit ikki, um útskiftingin skal tryggjast í ásetingunum, men undir øllum umstøðum er tað sera óheppið, at tað ikki kemur nýggjur íblástur í nevndararbeiðið. Eg kenni tað soleiðis, at eg havi ikki meiri at geva í hesum arbeiðnum. Og mínar royndir í altjóða samstarvi eru, at talan er um útskiftingar. Teir flestu sita í eini átta ár ella har á leið, so taka teir seg aftur.

Vilt tú harvið hava feløgini at vraka teir, sum tú hevur sitið saman við og velja aðrar í staðin?

– Feløgini gera sjálvi av, hvønn tey velja í FSF nevndina. Tað, sum eg kvígi fyri, er, at eingi onnur uppskot eru enn endurval. Tá sama nevnd hevrur sitið í eitt heilt ættarlið, so kann tað so skjótt verða, at tað verður neyðugt at skifta alla nevndina út í senn, og so fara nógvar royndir fyri skeytið, sum tað annars hevði verið natúrligt, at nýggju nevndarlimirnir fingu í arbeiðnum frá teimum, sum hava sitið longri, heldur Torleif Sigurðsson.

# Noregs dysturin verður helst av ongum

**Einasta, sum er greitt fyri komandi ár, er, at Liktinstein eigur at koma henda vegin**

A-LANDSLIÐ
Jóannes Hansen

Leygardagin 6. oktober er síðsti landsdysturin í HM undankappingini á skránni. Tá skulu føroyingar spæla í Ljubljana ímóti Slovnia, sum fyri einum ári síðani bara megnaði 2–2 á Svangaskarði.

Talan verður um torføra uppgávu. Í slovensku pressuni eru teir fyri langari tíð síðani farnir at hita upp til dystin. Og tað er ikki so undarligt, tí úrslitið verður avgerandi fyri, um Slovenia framvegis skal hava møguleika at sleppa við í HM endaspælið. Fótbóltsheimurin allur sum hann er, fer at fylgja við stríðnum hjá føroyingum, og serliga í Jugoslavia fara teir at taka á við føroyingum. Um Slovenia endar omaná ímóti Føroyum, verður vónin hjá Jugoslavia at sleppa upp í part í Japan og Suðurkorea burtur.


*Óvist tykist vera, nær A-landslið okkara í fótbólti aftur skal á vøllin, tá dysturin í Slovenia er lagdur aftur um bak*

## Óvissan

Tá landsliðsspælararnir fara at koma undan brúsuni í slovenska høvuðsstaðnum eiga teir at vita, nær næsti landsdysturin verður á skránni, og teir eiga ivaleyst eisini at vita, hvør verður landsliðsvenjari.

Í veruleikanum eigur landsliðið at spæla ein landsdyst afturat í ár. Talan er um dystin í NM kappingini ímóti Noregi. Hann er ikki dagfestur, og tað er lítið sannlíkt, at hann verður spældur:

– Vit hava fleiri ferðir spurt okkum fyri hjá norska fótbóltssambandinum, men einki er komið burturúr. Tað er Noreg, sum eigur heimavøllin, og tí halda vit, at bólturin liggur hjá teimum. Vit hava einki hoyrt frá teimum leingi, og tá NM kappingin verður liðug á nýggjárinum, eru vit so smátt farnir at ganga úr frá, at dysturin er dottin niður fyri. Vit hava í hvussu so er ikki nøkur boð at geva landsliðsspælarunum og venjaranum, og tí mugu vit rokna við, at landsliðsárið verður liðugt, tá landsliðið hevur spælt í Slovenia, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í Fótbóltssambandinum.

Tá landsdysturin í Slovenia er liðugur, er sáttmálaskeiðið hjá FSF og Allani Simonsen lokið.

Torleif Sigurðsson, formaður í FSF, sigur, at spurningurin um Allan Simonsen skal halda fram, ella um landsliðið skal hava ein nýggjan venjara, er ikki avgreiddur enn. Spurningurin liggur í landsliðsnevndini. Har er Jens Erik Magnussen formaður. Í løtuni er hann staddur uttanlands. Men tað verður roknað við, at spurningurin um framtíðina verður avgreiddur innan tann næsta mánaðin.

Jógvan Martin Olsen hevur verið hjálparvenjari hjá Allani Simonsen. Nú er avgjørt, at hann komandi ár skal venja NSÍ. Spurningurin um samstarvið millum FSF og Jógvan Martin Olsen er ikki liðugt viðgjørdur enn.

– Jógvan Martin hevur ein starvssáttmála við FSF. Vit skilja væl, at hann hevur hug at royna seg sum venjari í 1. deild. Um hann framvegis skal vera knýttur at Fótbóltssambandinum er ein spurningur, sum NSÍ, venjarin og FSF í løtuni viðgera, sigur Ísak Mikladal.

## Ikki nógv á skránni

Tað verður ikki roknað við, at talan verður um nógvar landsdystir fyrra partin av komandi ári. Í vetur fer lutur at verða kastaður um, hvussu europeisku fótbóltstjóðirnar skulu bólkast í EM undankappingini. Um tað verður, sum tað plagar at vera, so verður skráin løgd eina ferð í januar ella februar. Flestu tjóðirnar plaga ikki at vera áhugaðar í at spæla undankappingardystir, fyrrenn endaspælið, sum tey luttaka í, er liðugt. Tað vil siga, at tað er lítið sannlíkt, at undankappingardystir verða á skránni fyrr enn eftir summarfrítíðina.

Landsliðið plagar at vera á venjingarlegu í Spania eina ferð eftir ársskiftið. Vit hava ikki hoyrt annað, enn at hetta eisini verður soleiðis komandi ár.

Í 2000 var føroyska landsliðið í Liktinstein og spældi venjingardyst. Tann dysturin varð spældur 26. apríl. Tá varð avrátt, at Liktinstein skuldi koma henda vegin í 2001. Enn er ikki avrátt, nær dysturin verður spældur, men Ísak Mikladal heldur, at tað hevði verið hóskandi, at dysturin varð spældur um mánaðarskiftið mai og juni.

## Javnt í Lyngby

Síðsti dysturin í áttanda leikumfarinum í superliguni varð spældur í Lyngby mánakvøldið.

AGF vitjaði, og úrslitið var 1–1. Heimaliðið hevði bóltin mest, men gestirnir vóru vandamiklir í mótálopum. AGF kom á odda, tá hálvur tími var spældur, og heimaliðið javnaði, tá tað restaðu átta minuttir.

**-jh**